# Námsfrøðingur til Barnalund í Fuglafirði

**Søkt verður eftir:**

- Einum námsfrøðingi til barnagarðsstovu 35 tímar um vikuna at byrja 17. januar 2022.

- Um námsfrøðingur ikki verður settur, kann hjálparfólk verða sett í tíðaravmarkað starv.

**Hvørji eru vit:**

- Barnalund, er ein samansjóðaður dagstovnur ætlaður 60 børnum í aldrinum 0-6 ár. Stovnurin er skipaður í tvey hús,- við tveimum stovum í hvørjum húsi. Ein felagsgongd/-høll, við fjølbroyttum virksemismøguleikum, bindur húsini saman. Uttanumøkið hjá stovninum er stórt og endurspeglar í stóran mun uppruna lendið og bjóðar inn til ymiskar avbjóðingar. Meira kunning um stovnin og námsætlan finnur tú á: www.fuglafjordur.fo/borgari/born-og-ung/dagstovnar/barnalund/

**Vit sóknast eftir starvsfólki:**

- ið hevur umsorgan fyri børnunum.
- ið bæði kann arbeiða sjálvstøðugt og í toymi.
- ið er sinnað at arbeiða eftir okkara námsætlan.
- ið er týðiligt í samskifti og leggur dent á gott samstarv.
- ið hevur arbeiðsroyndir, sum kunnu nýtast í dagliga arbeiðinum. Royndir við Karlstad og tekn til talu kann vera ein fyrimunur.
- ið er eldhugað og konstruktivt.
- ið sær møguleikar fram um mørk.

**Vit kunnu bjóða tær:**

- áhugavert og avbjóðandi starv.
- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur.
- eitt starv, har tú kanst nýta tínar dygdir, hava ávirkan og samstundis menna teg sjálvan.
- sparring við aðrar námsfrøðingar í toymi.

**Setanartreytir:**

Løn eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meira fæst at vita um størvini:**
Vilt tú vita meira um stovnin og størvini, kanst tú seta teg í samband leiðaran í Barnalund Hannu I. Hansen á tlf. 238031.

**Umsókn:**
Umsókn saman við prógvi og møguligum viðmæli/-um, skal sendast til býráðsskrivstovuna: Í støð 5, 530 Fuglafjørður ella umvegis teldupost á info@fuglafjordur.fo. Umsóknarfreistin er 4. januar 2022. Setanarsamrøður verða í viku 1-2.

**Fuglafjarðar kommuna**

**Í støð 5, 530 Fuglafjørður**

**info@fuglafjordur.fo**